RUNAVÍKAR
kommunuskúli

Glyvravegur 10A · FO 625 Glyvrar
Tlf. 447331 · fax 447767
t-postur: rks@skulin.fo

## Lærarastørv í Runavíkar kommunuskúla

Til skúlaárið 2008/09 verður søkt eftir 9 lærarum at byrja 1. august 2008.

- 7 lærarum í tíðaravmarkað fulltíðarstarv skúlaárið 2008/09 fyri lærarar í farloyvi og avlopstímar.
- 2 lærarum í tíðaravmarkað stytri enn eitt ár fyri lærarar í farloyvi

a) eitt starv fulla tíð fyri lærarar í barnsburðarloyvi frá skúlaársbyrjan til u.l. 1. mars 2009.

b) Eitt starv 21 tímar um vikuna fyri lærara í farloyvi til 1. jan 2009.

Søkt verður eftir lærarum, sum kunnu lesa tímar í m.a.

Innskúlingini, miðdeildini, framhaldsdeildini og í serstovunum.

Umsøkjararnir mugu hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinaøkjum: máli, støddfrøði, ítrótti, kunningarlærugreinunum, handaligu lærugreinunum, bókasavn, teldulæru og at arbeiða við næmingum við breki.

**Vit vænta, at tú**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert virkisfús/ur og ert hugað/ur fyri toymissamstarvi
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið eru allir skúlarnir, sum hoyra til Runavíkar kommunuskúla. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjamálaráðið og Føroya Lærarafelag. Størvini eru treytað av, at tímajáttanin heldur.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, c.v. og møguligum ummælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mikudagin 18. juni 2008, kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið frá Ásmund Lamhauge, skúlastjóra á tlf. 447331 & 217331 ella Duritu P. Joensen, varaskúlastjóra á tlf. 447331 & 221363.

**Runavíkar kommunuskúli** hevur komandi skúlaár um 432 næmingar og um 52 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/rks

## Hús á Toftum til sølu

Um hóskandi boð fæst verður ognin Regnavegur 45, matr. nr. 368c, Tofta bygd seld. Talan er um eini minni hús á umleið 35 fermetrar í einari hædd við krúpikjallara og tilbygningi uppá 10 fermetrar.

Innrætting: Køkur/stova saman, gangur, baðirúm og kamar. Miðstøðuhiti er í húsinum. Húsini eru bygd sum eini sethús, men mest nýtt sum summarhús. Alt innan í húsinum fylgir við keypinum. Húsini eru í góðum standi, urtagarður er eisini. Grundøkið er 453 fermetrar.

**Nærri upplýsingar fáast á telefon 374 512 og fartelefon 22 18 92.**
**Teldupost: nordberg@post.olivant.fo**

## SANDOYAR MEGINSKÚLI

Heimasandsvegur 142 · 210 Sandur
Tlf. 361038 · fax 361866
t-postur: samesk@post.olivant.fo

## Lærarastørv í Sandoyar Meginskúla

**lýst leys til setanar frá 1.august 2008.**

**Søkt verður eftir lærarum**
- trimum í føst størv, sum eru fulltíðarstørv
- einum – møguliga tveimum - í tíðaravmarkað størv vegna farloyvi, lækkað tímatal, serligan tørv og avlopstímar; seinna starvið er parttíðarstarv, har endaliga tímatalið verður ásett eftir 1.sept.

**Søkt verður eftir lærarum, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru í skúlanum
- eru við til áhaldandi at menna skúlan
- eru stundisligir og nærlagdir

**Okkum tørvar lærarar, sum kunnu átaka sær eina ella fleiri av hesum uppgávum:**
- flokslæraraarbeiði
- undirvísa í gentuítrótti/ svimjing
- undirvísa í kunningarlærugreinum, føroyskum, donskum, týskum, alis/ evnafrøði og støddfrøði
- undirvísa í handaligum lærugreinum

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar eiga at hava læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi í nevndu lærugreinum/ lærugreinaøkjum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum, men læraralesandi, ið lúka prógv í summar, kunnu eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt í lønarflokkunum 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Tíðaravmarkaðu størvini verða sett fyri skúlaárið 2008/ 09.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 24.juni 2008 kl.1200

Nærri fæst at vita um størvini hjá Elnu Skylv Hansen, skúlastjóra, á telefon 361038/ 216038 ella hjá Eyðfinni Stórá, varaskúlastjóra, á tlf. 361247/ 268969, ella við at senda t-post til skúlan samesk@post.olivant.fo

**Sandoyar Meginskúli** hevur um 100 næmingar og 13 lærarar komandi skúlaár. Næmingarnir eru úr 6. upp í 10.flokk. Arbeitt verður alsamt við at menna skúlan.

## Aðalfundur

Hjá Gjovmanni verður í Miðlahúsinum mikudagin 25. juni kl. 19.

Skrá. Sambart lóg felagssins.

**Gjovmaður**

### Sands Skúli

# Lærarar

**Søkt verður eftir 2 lærarum í føst størv frá 1. august 2008 í Sands skúla.**

Søkt verður eisini eftir 2 lærarum til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 vegna avlopstímar og niðursetta tíð. Annað starvið er fulltíðarstarv og hitt eru avlopstímar. Endaliga tímatalið til hesi størv verður sett í september.

Í Sands skúla komandi skúlaár verða 55 næmingar og 8 lærarar. Nýggjur skúli er í gerð, sum verður liðugur um árskiftið 2008/09. Skúlin verður bygdur í einari hædd, og har verður rúmligt inni. Skúlin verður ein nýmótans skúli við m.a. ektroniskum talvum.

**Søkt verður eftir lærara sum m.a.:**
- Undir ábyrgd leiðslunar og í samstarvi við lærarir skúlans taka lut í dagliga virksemi skúlans.
- Eru fús at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum.
- Eru við til áhaldandi at menna skúlan.
- Duga at samstarva.
- Kunnu átaka sær: ábyrgd av ítrótti, handverk/ list, Náttúru/tøkni, enskt, heimstaðarlæru og telduundirvísing. Allar lærugreinar eru hjá 1. – 5. Flokki.

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða, skulu helst hava læraraútbúgving, linjugreinar og aðrar møguliga arbeiðsroyndir.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 29.2. Størvini verða sáttmálasett, uttan so, at tann, sum settur verður er tænastumannasettur lærari frammanundan.

**Umsóknir:**
Umsóknir við viðmælum, avrit av prógvum o.ø. skulu vera skúlaleiðaranum í hendi seinasta lagi 24. Juni 2008 kl. 12.00.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Kristian Højsted, á telefon 361623 ella 252854.

**Sands Skúli**
**210 Sandur**

## Grundstykki til sølu

Grundstykki á 844 m² í Trongisvági til sølu fyri kr. 70.000,-

Fleiri upplýsingar fáast við at senda ein t-post til:

**fs555fs@yahoo.dk**